B36 – Sumba 0-2 (0-1):

Sumbingar fult stigatal

Eftir tríggjar dystir í 2. deild hevur Sumba fult stigatal. Mánadagin vunnu sumbingar útsetta dystin móti B36 við tveimum málum móti ongum. Heimaliðið fekk tveir leikarar riknar av vølli í seinna hálvleiki

2. DEILD
Jákup Mørk

Sumba er oddalið í 2. deild, nú tríggir dystir eru leiktir. B36 tók mánadagin móti Sumba á heimavølli, og endin var, at sumbingar fóru við øllum stigunum.

Tað var tó B36, sum legði harðari út og hevði eisini tann fyrsta málmøguleikan. Ein langur bóltur varð sendur inn í brotsteigin, har ein B36-ari kom at standa rættiliga leysur. Hann valdi tó at skjóta fyrstu ferð, og bólturin fór framvið.

B36 hevði bóltin nógv meira hesa fyrstu løtuna av dystinum, men eftir hetta kom stutt sagt einki burtur. Sumbingar vardu væl og satsaðu uppá skjótálop.

Tað var eisini eftir eitt slíkt, at Sumba fekk tað fyrsta málið. Ein langur bóltur varð sendur fram móti brotsteiginum. Johnny Skibenæs var hægstur og snittaði hann víðari til Hall Dam Jacobsen, sum gjørdist púra leysur við málverjanum. Hann hevði góða tíð og legði Sumba framum.

Hetta var ein dyggur smeitur fyri B36, sum hevði havt leikliga yvirvág tó uttan at fáa nakað burtur.

Sumba økir

Í seinna hálvleiki var tað aftur B36, sum skuldi leggja tryst á, meðan Sumba meira var í bíðistøðu.

Hesin taktikkur eydnaðist avbera væl, tí B36 megnaði ikki at skapa nakrar veruligar málmøguleikar eftir steðgin, men hinvegin var tað Sumba, sum økti um leiðsluna.

Sumba vann triðja dystin av trimum møguligum, og teir eru nú einsamallir á odda í næstbestu deildini

Mynd: Álvur Haraldsen

Aftir hesuferð var tað Johnny Skibenæs, sum var uttanfyri brotsteigin, og hann sendi stutt til Eirik Joensen, sum var leysur við málverjanum, og hann skoraði.

Samanumtikið var sigurin hjá Sumba fult uppiborin, og liðið hevur nú fult stigatal eftir tríggjar dystir. B36 hevur hinvegin fingið ein sigur, ein javnleik og eitt tap.

Sumbingar kunnu væl gerast drúgvir í ár, og oddaliðini fara óivað at hava eyguni við Sumba gjøgnum kappingina.

Móti endanum av dystinum rak dómarin tveir mans hjá B36 av vølli. Orsøkin í báðum førum var, at leikararnir vóru ov frekir í munninum móti dómaranum. Við bert nøggju monnum hevði B36 ongan møguleika at koma innaftur í dystin.

B36 – Sumba 0-2 (0-1)

0-1: Hallur Dam Joensen
0-2: Eirik Joensen

Michael Laudrup skal venja Brøndby

Hjálparvenjarin hjá danska landsliðnum verður í hvussu so er tvey tey næstu árini venjari hjá meistaraliðnum í Brøndby

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað valdar friður í danska fótbóltsheiminum. Í hvussu so er í superliguni, har síðsta umfarið var á skránni hóskvøldið.

Men tað verður arbeitt av lívsins kreftum handan leiktjøldini. Sáttmálasamráðingar eru millum spælarar og feløgini, sum teir hava verið í og við feløg, sum eru áhugað í at keypa spælarar, og á venjara-síðuni gongur eisini nógv fyri seg.

Síðsta kappingarár varð venjarin skiftur út í helminginum av feløgunum í superliguni. Brøndby var eitt av feløgunum, sum skifti venjara. Åge Hareide legði frá sær, Tom Køhlert tók við, og Brøndby vann meistaraheitið, sum teir nú siga, at teir neyvan høvdu vunnið, um norski venjarin hevði hildið fram í felagnum.

Tom Køhlert er ikki nýggja typan av venjara. Hann tykist eitt sindur bygdasligur og trívst ikki við miðlafólkunum kring seg alla tíðina. Longu tá hann tók ábyrgdina at venja besta Brøndby liðið á seg, segði hann, at hetta var bara fyribils og inntil summarsteðgin. Tá ætlaði hann sær aftur til unglingaliðið, og maðurin, sum í áttatiárunum gjørdi Brøndby til fleirfaldar meistarar, hevur hildið orð.

Tað hevur leingi ljóðað, at Michael Laudrup skuldi vera nýggi venjarin í Brøndby. Login undir gitingunum kveiktist av álvara, tá Michael Laudrup í vetur boðaði frá, at hann eftir HM endaspælið í Japan og Suðurkorea ikki ætlaði sær at halda fram í starvinum sum hjálparvenjari hjá danska landsliðnum og Morten Olsen.

Mánadagin vórðu tíðindini staðfest. 1. juli fara Michael Laudrup og Brøndby undir samstarv. Michael Laudrup skal vera venjari. Í fyrstu atlogu er tvey ára sáttmáli undirskrivaður, og partarnir siga seg vóna, at samstarvið fer at halda longri enn so.

Felagið sigur seg vera ovurfegið um, at teir hava fingið ein av bestu spælarunum í heiminum tey seinastu árini og ein av

Michael Laudrup, sum her sæst sita á Hotel Føroyum, verður nýggjur venjari hjá donsku meistarunum úr Brøndby

mest avhildnu persónunum í fótbóltsheiminum í sín part.

Michael Laudrup sigur seg vera fegnan um, at hann fær møguleikan at verða venjari í felagnum, sum hann spældi í barnaárini og árini, sum hann var í bestu deildini í Danmark (burtursæð frá tá hann sum 16 ára gamal var í KB, har John Kramer var venjari). Í 1983 fór Michael Laudrup, sum er føddur 15. juni í 1964, úr Brøndby og til Lazio. So spældi hann í Juventus, Barcelona og Real Madrid, áðrenn hann gavst og seinni gjørdist hjálparvenjari hjá Morten Olsen. Fyrsti dysturin hjá teimum báðum við danska landsliðsróðrið var 16. august í 2000 í Gundadali.

Nú Michael Laudrup er komin aftur til Brøndby, er ringurin komin saman aftur. Pápi Michael, Finn Laudrup, spældi síni seinastu fótbóltsár í Brøndby, har svágur hansara, Ebbe Skovdal, sum nú er venjari í Aberdeen, í nógv ár og í fleiri umførum hevði ábyrgdina av besta liðnum. Yngri Laudrup beiggin, Brian, spældi eisini ungdómsárini og fyrstu vaksnamanna árini, áðrenn hann varð seldur uttanlands, í Brøndby.

Nú vóna teir í Brøndby, at samstarvið við Michael Laudrup skal knýta gávuríku familjuna tættari at felagnum. Tað kann hava týdning, sum næsta ættarliðið fer at vaksa til – bæði ítróttarliga og figgjarliga.

Ivasamir

Per Bjerregaard var høvuðsmaður í Brøndby, tá Michael Laudrup spældi har, og hann er framvegis stjóri í Brøndby. Bæði Per Bjerregaard og Michael Laudrup harmast um, at tað gjørdist neyðugt hjá nýggja venjaranum at taka við í summar í staðin fyri á nýggjárinum komandi, sum ætlanin var, áðrenn Åge Hareide segði seg úr starvinum.

Stjórin og nýggi venjarin ásanna, at skotbráðið verður stutt hjá nýggja venjaranum frá tí, at hann kemur aftur frá HM endaspælinum og inntil farið verður undir nýggja kappingarárið í superliguni.

Ein av spurningunum, sum greiða skal fáast á, er, hvørjir spælarar fara at vera í Brøndby eftir summarsteðgin.

Álopsspælarin Peter Madsen varð sunnudagin kosin ársins spælari 2001–2002 í superliguni. Hann fór sama dag við landsliðnum til HM endaspælið. Tað verður roknað við, at Brøndby hevur møguleika at selja hann fyri einar 50 milliónir krónur, men eingin avgerð verður tikin um hetta, fyrrenn hann kemur aftur frá HM endaspælinum. Tað sigur í hvussu so er Per Bjerregaard.

Michael Laudrup ætlar, at liðið hjá honum skal spæla sambært fótbóltsfatanina, sum hann sjálvur altíð hevur havt:

– Tað snýr seg um at vinna, og tað vilja vit sjálvandi. Men vit ætla okkum at undirhalda, vera spælstýrandi og framrættaðir, sigur Michael Laudrup. Útsøgnin er ikki óvæntað, tá hugsað verður um, hvat hesin snillingurin hevur staðið fyri í Italia, Spania, og á danska landsliðnum, og hvat hann og Morten Olsen hava viljað og viðhvørt hava megnað at fingið danska landsliðið at vist á vøllinum.

Tað lætnaði eitt sindur hjá Hvidovre

Sigurin á útivølli ímóti einum av oddaliðunum hevði við sær, at Óli Johannesen og liðfelagarnir komu fimm stig burtur frá niðurflytingini

1. DEILD DANMARK
Jóannes Hansen

Tað er framvegis ikki greitt, hvat fyri eitt felag Óli Johannesen fer at umboða eftir summarsteðgin. Tað er heldur ikki greitt, um felagið, sum hann hevur umboðað seinastu árini, eftir summarsteðgin verður í næstbestu deildini, ella um teir fara at flyta niður í 2. deild.

2. hvítusunnudag lætnaði tað eitt sindur hjá Óla Johannesen og liðfeløgunum, sum kortini framvegis eru illa sperdir av hóttanini av niðurflyting. 2–1 sigurin hjá Hvidovre á útivølli ímóti HFK Sønderjyllandi hevði við sær, at Hvidovre kom sær fimm stig burtur frá niðurflytingarplássinum. Skive hevur bara ellivu stig og er flutt niður. Síðani eru fleiri lið, sum hava 23 stig. B1909, sum er næstniðast, vann hesa ferð óvæntað á útivølli ímóti Brønshøj. Liðið úr Odense vann 1–0, og harvið lyftu teir sær upp á sama stigatal sum eitt nú Fredericia og B93. Kolding hevur 24 stig, og so hevur Hvidovre 28 stig.

Óli Johannesen hevur verið skaðaplágaður í eitt skifti nú í vár. Hesa ferð var hann aftur í miðverjuni hjá Hvidovre, sum var á odda 1–0 í hálvleikinum. Eftir steðgin vóru teir í HFK so óhepnir, at teir gjørdu sjálvmál. Í 78. minutti minkaði heimaliðið um munin. So trýstu teir fyri at javna, men tað eydnaðist Óla og teimum at koma undan við øllum stigunum.

Óli Johannesen var ikki millum málskjúttarnar hjá Hvidovre hesa ferð. Hóast hann er í miðverjuni, so er Óli tann, ið hevur skorað næstflest mál fyri Hvidovre í hesum kappingarárinum. Toppskjúttin hevur skorað níggju mál í landskappingini, og Óli Johannesen hevur skorað sjey mál.

Sigurin á HFK hevði við sær, at góða gongdin síðstu vikuna helt fram. Næstseinast spældi Hvidovre ímóti Køge, sum er á uppflytingarkós. Hvidovre vann tann dystin 3–0.

Hóast óskilið sigst vera og er stórt í Farum, so gongst tað væl í fótbóltinum. Hesa ferð vann Farum á heimavølli 3–1 ímóti Herfølge, sum hevur havt rættuligan undanvind seinastu tíðina. Køge hevði vitjan av B93, sum varð sent til hús við 2–1 tapi. Gamla stórfelagið á Eysturbrúgv stendur heilt illa í tí.

Fredericia við Johan B. Hansen hevði vitjan av Frem, sum seinastu tíðina hevur havt eitt sindur ilt við at hanga uppií toppinum. Høvuðsstaðarfelagið megnaði ikki at fáa meiri enn 2–2 við sær aftur til Valby.

Randers Freja, sum hevur Atla Gregersen í spælaraháopinum, vann á heimavølli 3–1 ímóti Skive, sum longu er flutt niður í 2. deild.

Danska 1. deild

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Farum	25	17	6	2	56	29	27	57
2	Køge	25	17	3	5	49	28	21	54
3	Frem	25	13	8	4	48	28	20	47
4	HFK Sønderj.	25	14	3	8	47	43	4	45
5	Herfølge	25	12	7	6	41	29	12	43
6	B 1913	25	11	9	5	39	32	7	42
7	Randers F.	25	12	5	8	48	28	20	41
8	AC Horsens	25	9	8	8	32	26	6	35
9	FC Aarhus	25	9	6	10	34	38	-4	33
10	Hvidovre	25	7	7	11	39	44	-5	28
11	Kolding FC	25	6	6	13	39	52	-13	24
12	Fredericia	25	5	8	12	34	36	-2	23
13	B93	25	6	5	14	32	50	-18	23
14	Brønshøj	25	6	5	14	35	55	-20	23
15	B 1909	25	6	5	14	38	59	-21	23
16	Skive	25	2	5	18	28	62	-34	11

Føroyskir leikarar:
Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Norska tippeligan

		d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Lyn	8	7	0	1	15	8	7	21
2	Molde	8	4	2	2	14	8	6	14
3	Bodø/Glimt	8	4	2	2	13	7	6	14
4	Rosenborg (M)	8	4	1	3	16	10	6	13
5	Odd. Grenl.	8	4	1	3	11	9	2	13
6	Váleranga	8	3	3	2	12	8	4	12
7	Viking	8	3	3	2	14	11	3	12
8	Stabæk	8	3	3	2	12	11	1	12
9	Lillestrøm	8	2	4	2	7	6	1	10
10	Brann	8	3	1	4	11	14	-3	10
11	Bryne	8	2	1	5	8	15	-7	7
12	Moss	8	1	3	4	9	18	-9	6
13	Sogndal	8	1	2	5	10	20	-10	5
14	Start	8	0	4	4	6	13	-7	4

Føroyskir leikarar:
Jákup Mikkelsen (Molde)

Sogndal fyrsta sigurin

Jákup Mikkelsen var mánakvøldið við næstbesta liðnum í Molde á Bislett í Oslo

NOREG
Jóannes Hansen

2. hvítusunnudagur var næstan hjá øllum í tippuliguni í Noregi frídagur. Bara ein dystur var á skranni. Tað var útsetti heimadysturin hjá Sogndal, sum hevði vitjan av Bryne.

Higartil hevur gingið illa hjá gamla føroyska felagnum, men hesa ferð eydnaðist. Sogndal vann 3–2, men tað sá leingi einki út. Bryne fekk hol á í síðsta minuttinum undan steðginum, tá teir komu sær í kontraálop. Eftir steðgin kom Sogndal upp á javnleik, og teir løgdu seg eisini á odda 2–1. Málini komu í 53. og 56. minuttunum.

Tiggju minuttir seinni javnaði Bryne enn eina ferð, og so sá tað út sum um, at Sogndal enn eina ferð skuldi fara av vøllinum uttan at hava vunnið. Men fýra minuttir undan leikloki eydnaðist tað Sogndal at senda bóltin í málið aftanfyri Knut Lillebakk, málverjan, sum Bryne hevur leigað úr felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Molde.

Í høvuðsstaðnum

Hjá Jákupi Mikkelsen er fótbóltslívið í Noregi einki hugaligt í hesum døgum. Hann er á beinkinum hvørja ferð besta liðið spælir, og so ferðast hann runt stóra Noregi við næstbesta liðnum.

2. hvítusunnukvøld vóru hann og liðfelagarnir á Molde liðnum í 2. deild í Oslo. Har spældu teir ímóti Frig, ið er eitt av feløgunum, sum hevur heimavøll á Bislett. Hetta navnið komast fleiri ivaleyst við í sambandi við frælsar ítróttar kappingar.

Jákup megnaði sína uppgávu til fulnar. Molde vann 2–0. Tað var eisini støðan í steðginum. Men tað er neyvan ein tílíkan dyst, at ein málverji, sum hevur roynt at verða danskur meistari, og sum hevur vart føroyska málið ímóti nógvum heimsstjørnum, fer at minnast.

Sosialurin -har tað hendir

Fótbóltsdansur

Í londunum kring okkum er tað vorðið alt meira vanligt, at ítróttarfeløg av ymsum slag hava tikið amerikanska hugskotið »cheer-leaders« til sín.

Fram til mánadagin var hetta tó ikki nakað, sum føroysk fótbóltsfeløg høvdu tikið til sín, men tað hava yngstu genturnar hjá B36 nú broytt. Undan dystinum móti HB komu tær nevnliga á vøllin, har tær í einar fimm minuttir royndu at hita áskoðarnar upp, soleiðis at lagið var hitt rætta alt fyri eitt, tá grannauppgerðin móti HB varð blást ígongd.

Helst høvdu ungu kvinnurnar vónað, at úrslitið av dystinum hevði verið nakað øðrvísi, men vónandi hava tær tó ikki mist mótið, soleiðis at vit aftur kunnu síggja tær, tá B36 næstu ferð spælir á heima vølli.

Yngstu genturnar hjá B36 royndu undan grannauppgerðini at fáa rætta lagið á áskoðararnar, og hetta megnaðu tær í øllum førum betri enn besta manslið felagsins

Mynd: Álvur Haraldsen